# Nýggja stjórnarskipanarlógin skal ikki vera ein fullveldis-grundlóg

HELGI ABRAHAMSEN



Stjórnarskipanarnevndin (sum er framhald av gomlu Grundlógarnevndini), er aftur farin til verka. Málið er at gera eina stjórnarskipanarlóg fyri Føroyar, sum bæði skal kunna brúkast undir verandi skipan, og eisini undir eini møguligari broyttari skipan einaferð í framtíðini. Men Stjórnarskipanarlógin í sær sjálvum broytir ikki ríkisrættarligu viðurskiftini.

Upprunaliga endamálið við arbeiðinum í Grundlógarnevndini (sum hon tá æt), var at gera eina grundlóg fyri føroyska fullveldisríkið. Grundlógin skuldi koma ístaðin fyri ta donsku grundlógina. Men umstøðurnar broyttust, og við tíðini gjørdist fólki greitt, at fullveldisætlanin hjá tásitandi landsstýri bleiv ikki til nakað. Hildið var tó, at arbeiðið sum var gjørt í Grundlógarnevndini átti ikki at fara fyri skeytið, og tí varð hildið fram við arbeiðinum, nú við heitinum "Stjórnarskipanarnevndin". Men hvat skal Stjórnarskipanarlógin brúkast til, nú Føroyar ikki verða fullveldisríki?

**Verandi skipan**

Vit hava í dag eina skipan, har danska grundlógin stendur ovast. Undir henni er Heimastýrislógin, sum í síni tíð flutti ein part av løggávuvaldinum aftur til Føroya. Síðani hava vit Stýrisskipanarlógina, sum skipar valdið ímillum føroyingar, og undir henni eru vanligu løgtingslógirnar, sum áseta reglur fyri hvørt einstakt øki. Síðani hava vit kunngerðir, sum áseta nakrar smálutir í teimum einstøku løgtingslógunum o.s.fr.

Málið við gomlu Grundlógarnevndini var at gera eina grundlóg, sum skuldi taka ovasta plássið frá donsku grundlógini. Men hvar skal Stjórnarskipanarlógin vera í skipanini, nú fullveldisætlanin ikki bleiv til nakað?

Danska grundlógin er galdandi fyri alt tað danska ríkið, og tí kunnu vit ikki vera partur av ríkinum uttan at vera undir grundlógini. Tað er tí útilokað at seta stjórnarskipanarlógina á "ovastu hyll".

Tað verður uttan iva trupult at finna semju um henda spurningin, men kanska finst ein smidliga orðing, sum allir partar kunnu liva við.

**Ein víðkað stýrisskipanarlóg**

Sambandsflokkurin hevur ta áskoðan, at Stjórnarskipanarlógin skal avloysa Stýrisskipanarlógina, men skal samstundis vera meira umfatandi enn Stýrisskipanarlógin er. Meðan verandi stýrisskipanarlóg bert hevur ásetingar um landsins stýri, so skal Stjórnarskipanarlógin harafturat eisini hava ásetingar um onnur øki í samfelagnum.

**Tríggir menn eiga Stýrisskipanarlógina**

Ein vansi við Stýrisskipanarlógini, sum vit ikki mugu fáa í Stjórnarskipanarlógina, er, at hon er ógvuliga tengd at ávísum persónum. Hvørja ferð okkurt ivamál er um, hvussu eitt ella annað í lógini skal tulkast, ringja fjølmiðlarnir til ein av teimum trimum juristunum, sum gjørdu uppskotið til Stýrisskipanarlógina, og tá hesin hevur úttalað seg, hevur eingin annar loyvi til at halda nakað annað. Teir eru vorðnir eitt slag av "ovasta tulkingarmyndugleika", tí tað vóru teir, sum gjørdu uppskotið. Hetta má ikki endurtaka seg við Stjórnarskipanarlógini. Hon má kunna lesast av øllum, og øll mugu kunna kjakast um innihaldið, eisini tey, sum ikki hava verið við til at gjørt hana.

**Breiða semjan**

Líkamikið hvar í systeminum Stjórnarskipanarlógin endar, so er umráðandi, at breið semja verður um hana. Tað gevur onga meining at gera eina skipan, sum 51% av fólkinum tekur undir við, meðan 49% eru ímóti. Um vit ikki megna at finna eina breiða semju um stjórnarskipanina, er hon einki verd.

Tá tað er sagt, so sigur tað seg eisini sjálvt, at jú meira ítøkilig vit eru viðvíkjandi teimum ríkisrættarligu orðingunum, minni verður undirtøkan, tí vit sleppa ikki undan tí veruleika, at vit eru ósamd um tann spurningin.

**Aftaná 10 ár, mugu vit koma á mál**

Tað verða skjótt 10 ár liðin, síðani Grundlógarnevndin / Stjórnarskipanarnevndin fór til verka, so tíðin má vera komin, hvar ið semja verður gjørd um eitt ella annað úrslit.

Fyri okkum sum umboða Sambandsflokkin í Stjórnarskipanarnevndini er eingin ivi um, at Stjórnarskipanarlógin er ikki ein fullveldis-grundlóg, men ein lóg, sum fyrst og fremst skal kunna brúkast undir verandi skipan.

# Morgunlesturin avhøvdaður – kunngerið kanningina, sum er orsøkin til hetta!

SÚNI KRISTIANSEN

Hvør hevur orðað spurningarnar? – og hvussu?

Hvør hevur svarað spurningunum? – og hvussu?

Hvør hevur tulkað svarini? – og hvussu?

Í meira enn eina viku hava vit ikki fingið morgunlesturin endursendan, og tað eru nógv fólk - ikki bert gomul og pensiónistar - sum plaga at lurta og tí sakna hetta. Endursendingin í myndaleysa SVF er betri enn einki, men er ikki nøktandi fyri tey mongu, sum koyra bil, eru til arbeiðis í vøggustovum, handlum, smiðjum, á skrivstovum, virkjum, skipsdekki ella eru við hús og hava annað at takast við enn at seta seg framman fyri sjónvarpinum. Útvarpið hevur so vælsignað nógvar møguleikar – tað kanst tú hava við tær alla staðni.

Avhøvdingin av morgunlestrinum er bert tann síðsta av ógvusligu broytingunum, sum nýggja leiðsla Kringvarpsins hevur framt – hvør óhepnari enn onnur. Føroyingar eru tolnir, viðhvørt kanska ov tolnir, og fá hava talað at, men nú er farið at prutla undir lokinum, og fleiri og fleiri krevja, at leiðslan stingur fingurin í jørðina og umhugsar sínar broytingar, so at ikki alt ov nógv verður niðurbrotið og oyðilagt, men at broytingar verða til tað betra, samstundis sum tað góða gamla fær frið.

Sum føroyingur havi eg altíð verið stoltur av Kringvarpinum (serliga Útvarpinum). At ein so lítil tjóð skal hava eitt so fjølbroytt, aktuelt og áhugavert útvarp, er undrunarvert, og stóra tøkk eiga slóðbrótararnir har saman við dugnaligum starvsfólkum fyri sítt væl útinta verk. Tíverri hava fleiri teirra fingið eina sera óvirðiliga viðferð frá nýggju leiðsluni – hugstoytt og stór skomm, tá hugsað verður um, hvørji mentanarvirði teir gjøgnum ÚF hava givið okkum. Eg meti, at ÚF hevur havt týðandi leiklut at skapa samleika okkara sum føroyingar, og ilt er at ímynda sær, hvar vit vóru sum fólk, um vit ikki høvdu havt ÚF seinastu hálvu øldina við teimum eldsálum, sum har hava virkað.

**Ein "postalínshandil"**

Men, sum alt annað virðismikið, er eisini hesin dýrgripur viðbrekin – sum vørurnar í einum postalínshandli. Vit gleðast um alt tað virðismikla og vakra, sum har er, sumt brúka vit, meðan vit vita, hvar vit skulu leita eftir hinum, tá vit hava brúk fyri tí. Gaman í vita vit, at okkurt eigur at verða støvað av, og partvís hevur tað eisini verið gjørt, tá sendingar eru dagførdar ella tiknar av skránni og komnar fram aftur i nýmótans líki osfr.

Men framferðin hjá nýggju – áramálssettu – leiðslu Kringvarpsins er so als ikki nøkur "avstøving", tá hon trampar runt millum postalínsdýrgripirnar, sum av sonnum mugu sigast at vera OGN FØROYA FÓLKS !!! Hetta hevur hon ongan rætt til! Niðurbrótingin og oyðileggingin má halda uppat!

**Kanningin**

Aftur til morgunlesturin. Leiðslan sigur seg hava gjørt eina kanning, sum er grundarlag undir støðutakanini til at taka morgunlesturin av skránni kl. 9.50. Almannakunngerið hesa kanning, so eisini vit, vanligu lurtarar, kunnu meta um úrslitið og gera okkara egnu niðurstøðu. Vit hava øll krav upp á at síggja, hvussu tit eru komin fram til hesa avgerð og hava gjørt hesa ógvusligu broyting.

Setið kanningina i bløðini og leggið hana út á netið, so vit kunnu fáa svar upp á m.a. hesi viðurskifti:

- Hvør hevur orðað spurningarnar? – og hvussu?
- Hvør hevur svarað spurningunum? – og hvussu?
- Hvør hevur tulkað svarini? – og hvussu?

**"...et søkort at forstå – et skib at føre ..."**

Ein skipari, sum setir kós og so bert siglir hana við skýklaffum fyri eygunum – uttan at taka atlit til streym og vind á leiðini – fær eina buldruta ferð, kanska kemur hann als ikki fram. Við avhøvdingini av morgunlestrinum hevur Kringvarpsleiðslan rent seg í eina krappsjógvaða íðu, sum hon ger rættast í at hava virðing fyri, og tað kann gerast við at geva okkum endursendinga aftur á skránna kl. 9.50 – henda broyting kostar einki – og hevði kenst sum ein útrætt hond til fólkið við lyfti um ikki at trampa meira í OKKARA postalínshandli, men heldur fara varliga til verka – við einum støvklúti.~

MORGUNLESTURIN AFTUR Á SKRÁNNA KL. 9.50!!!

# Skerjingarnar á Vinnuháskúlanum

MASKIMEISTARAFELAGIÐ

Sum øllum kunnugt, so eru skerjingar gjørdar á figgjarlógini, sum meira og minni raka allar landsins stovnar, annahvørt sum beinleiðis skerjingar ella sum skerjingar av ætlanum.

Ein av hesum stovnum er Vinnuháskúlin, har m.a. maskinmeistarar og maskinistar fáa sínar útbúgvingar.

Tað er sjálvandi ikki lætt at velja burturúr, tá ið skerjast skal, men tá ið hugsað verður um, hvat vit her í Føroyum hava livað av í stórt hundrað ár og helst fara at liva av í rúma tíð enn, so er tað ófatuligt, at hesin skúli nú verður skerdur soleiðis, at hann ikki megnar at fylgja við tí hækkandi útbúgvingarstøði sum krevst og harafturat má gevast við at bjóða út maskinistútúgvingina.

Henda útbúgving gevur rættindi upp til 2999 kW og er tí nøktandi til allan okkara fiskiflota á nærleiðum og maskinistar kunnu eisini sigla sum maskinstjórar við øllum øðrum smærri skipum og sum 2. meistarar við stórum skipum.

Teir persónar, ið taka prógv á Vinnuháskúlanum, kunnu fara beinleiðis inn í okkara høvuðsvinnu og harafturat so geva útbúgvingarnar rættindi til altjóða viðurkend vinnubrøv soleiðis, at viðkomandi kunnu mynstra við einum og hvørjum skipi kring allan heimin.

Á hesum skúla er sostatt ikki talan um at fara undir nakað nýtt, sum møguliga kann kasta nakað av sær sum frá líður, men um útbúgvingar, sum allur heimurin spyr eftir her og nú og sum frá fyrsta degi geva fjølbroyttar møguleikar og góðar inntøkur.

Næmingar frá hesum føroyska skúla verða uttanlands mettir at vera á einum sera høgum fakligum støði og hetta man vera besta viðurkenningin, ið ein skúli kann fáa.

Maskinmeistarafelagið metir tí, at tað skuldi heldur verið uppgávan hjá myndugleikunum at givið einum slíkum skúla enn betur umstøður og harafturat í nógv størri mun at eggja ungdóminum til at søkja sær útbúgvingar innan hesar vinnugreinar. Her er ein av teimum fáu møguleikunum har tað ikki er neyðugt at fara av landinum til tess at fáa eina góða og viðurkenda útbúgving á altjóða støði.

Maskinmeistarafelagið fer tí at heita á avvarandi myndugleikar at síggja til, at útbúgvingar á Vinnuháskúlanum ikki verða skerdar. Fólk við hesum útbúgvingum eru enn krumtapparnir í okkara virðisskapan og ein og hvør slaking ella stagnatión á hesum øki er tí at meta óráð.